## Vilja hava Lenu

Tað eydnaðist eftir øllum at døma formanninum í konservativa fólkaflokkinum í Danmark, Bendt Bendtsen, at sissa teir ungu flokslimirnar, sum siga seg vera misnøgdar við leiðslu hansara. Men tað forðaði kortini ikki fyri, at tey ungu á landsfundi atkvøddu um, hvør eigur at taka við eftir Bendt Bendsen sum formaður. Ta atkvøðugreiðsluna vann løgmálaráðharrin Lene Espersen í dysti við Connie Hedegaard, umhvørvismálaráðharra.

## Ongar páskaferðir

Umleið 800 fólk høvdu bílagt sær ferðaseðil við grønlendska ferðamannaskipinum "Sarfaq Ittuk" um páskirnar, men skipið fekk skaða í illveðri og noyddist til Danmarkar at fáa skaðan umvældan. Tí er siglingin um páskirnar avlýst. Grønlendska útvarpið sigur, at reiðaríið hjá "Sarfaq Ittuk" roynir at útvega fólki pláss við flogførunum hjá Air Greenland ístaðin fyri, men trupulleikin er, at teir ferðaseðlarnir eru munandi dýrari. Og reiðaríið vil ikki rinda prísmunin.



Ikki er alt gull, ið glitrar:

# Nýggi Smyril illa gjørdur

**»Sópað undir teppið«! »Málað út yvir lortin«! Orðafelli, vit øll kenna og ofta nýta. Og tað er júst soleiðis nýggi Smyril verður umrøddur av keldum, Sosialurin hevur tosað við.**
**- Nógv av arbeiðinum kann kallast beinleiðis makkverk, sigur ein av álítandi keldunum.**
**- Barnasjúkur og einki meiri enn vanligt, sigur virkandi stjórin á Strandferðsluni, Niels Juel Arge**



SKIPASMÍÐ
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

»Skipasmiðjan meira ella minni býr umborð á Smyrli».

Hetta var pástandurin, ið Sosialurin setti sær fyri at kanna. Og eftir at hava troytt fleiri keldur er tað alt sum bendir á, at pástandurin er rættur.

Bæði Niels Juel Arge, virkandi stjóri á Strandferðsluni, og Mourits Mohr, tekniskur leiðari á Skipasmiðjuni, siga tó, at tað langt frá er óvanligt, at ábøtur verða gjørdar á nýggj skip leypandi.

- Tað er púra vanligt við »claims« (krøv, ið verða sett fram móti skipasmiðjuni viðvíkjandi slíkum, ið krevur ábøtur og umvæling) í sambandi við eitt nýtt skip. Og eg kann nevna, at hesi »claims« á Smyrli eru munandi færri enn til dømis tey, á Norrönu, sigur Niels Juel Arge, virkandi stjóri á Strandferðsluni.

Mourits Mohr vil ikki váttað, at menn frá Skipasmiðjuni »búgva umborð«, men viðgongur, at teir javnan hava havt arbeiðsfólk umborð á Smyrli líka síðani skipið kom til landið í november 2005.

- Men hetta er alt arbeiði, sum vit gera fyri sponsku skipasmiðjuna í sambandi við claims frá Strandferðsluni. Og slík claims eru púra vanlig í sambandi við nýggj skip, sigur Mourits Mohr.

### Skal valdast

So bæði virkandi Strandferðslustjóri og tekniski leiðarin á Skipasmiðjuni vilja vera við, at talan í allarstørsta mun er um barnasjúkur, sum finnast í hvørjari einasti nýbygging.

- Barnasjúkur finnast allastaðni, og sjálvandi eisini umborð á Smyrli. Men barnasjúkur skulu valdast. Nógv sær sera væl út við fyrsta eygnabrá, men hyggur tú nærri sær tú, at tað er gjørt á léttasta og bíligasta hátt , sigur ein av keldunum, Sosialurin hevur tosað við.

Aðrar keldur vátta tað sama.

Ein skuldi eisini trúð, at eitt nýtt skip sum Smyril skuldi verið so manningavinarligt, sum tilber, tí soleiðis er gongdin innan allar aðrar skipabólkar. Men fleiri dømi eru um, at nýggi Smyril er munandi óarbeiðsligari enn hin gamli, eins og goymsluplássið í fleiri førum er væl minni. Og tað er vælsaktans øvutur vegur at ganga.

Summastaðni lekur í eyri og seyri, og serliga stórir trupulleikar hava verið av stóru rútunum frammi í salongini.

Tað er frægari nú, men ferðafólk upplivdu javnan, at løk og handklæði lógu upp og niður gjøgnum trappurnar at turka vætu upp, partvís tí so illa lak, og partvís tí vatnskipanin trýsti vatnið upp gjøgnum ristirnar heldur enn at trýsta niður.

### Fáa tað, goldið er fyri

Rætt skal vera rætt, tað er ikki alt, ið er »nakað lort«. Okkurt av arbeiðunum hava virkað heilt eftir vild. Men eftir stendur kortini, at tað er ógvuliga nógv, ið kundi verið gjørt betur.

Tað er heldur eingin loyna, at Smyril var ein enntá sera tungur burður, og afturat vanligum seinkingum, sum nærum altíð uppstanda, var skipasmiðjan úti fyri bæði verkfalli og húsagangi. Spanska stjórnin traðkaði tó til og bjargaði skipasmiðjuni soleiðis, at skipið bleiv bygt liðugt. Men tað er væl hugsandi, at júst hesar nevndu hendingar hava gjørt sítt til, at handverkið ikki gjørdist so gott, sum ynskiligt var.

Tað stóð eisini greitt fyri skipasmiðjuni, at endurgjaldskrøv fóru at verða sett fram móti teimum frá føroyskari síðu, og tað er væl hugsandi, at hetta hevur verið viðvirkandi til, at spanska skipasmiðjan ikki hevur lagt so stóran dent á góðsku, men hevur »málað út yvir lortin«, sum tikið verður til.

Smyril gjørdist eisini munandi bíligari enn eitt skip av hesum slagi og stødd hugsandi átti, og tí er tað kanska eitt mál um at fáa tað, ein hevur goldið fyri. Spurningurin, ið stendur eftir, er, hví skipið eftir øllum at døma er so illa bygt tá vit vita, at Strandferðslan hevur havt fleiri eftirlitisfólk niðri í Spania í mánaðar, at fylgja við arbeiðinum.

Men tá leiðslan á Strandferðsluni ikki vil vera við, at nakað er galið við Smyrli, er ikki lætt at fáa svar upp á tann spurningin. Vit kunnu bert staðfesta oratakið: Tað er ikki alt gull, ið glitrar.

# Stór útstykking á Velbastað liðug



**Talan er um privata útstykking, ið telur 29 grundstykki. Og gravgangur hevur verið eftir teimum - og nú er bert eitt óselt stykki eftir**

ÚTSTYKKING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er ein fleiri ára gomul ætlan, ið nú endiliga er vorðin til veruleika.

Seinasta hond verður nú løgd á útstykkingina av Jákupstrøð við Gerðisbreyt, og talan er um 29 grundstykki.

Klárt var at byrja í fjør vár og fór arbeiðið í gongd 25. apríl. Stórur áhugi hevur sum vera man verið fyri hesum grundstykkjunum, og so at siga øll eru seld. Í skrivandi løtu er bert hitt eina stykki eftir.

Tó at grundstykkini eru eitt sindur ymisk til støddar, liggja tey øll millum 500 og 550 m2.

Talan er sum nevnt um eina privata útstykking, men kortini er kommunan partvís við í verkætlanini.

- Kommunan ger vegirnar, ið føra til útstykkingina. M.a. eru verandi vegir ov smalir og talan er tí um eina breiðking av hesum, sigur Jógvan Hans Østerø, arbeiðstakari.

Í august verður eftir ætlan farið undir hesa breiðkan av verandi vegi, sum bindur nýggju útstykkingina í høvuðsvegin. Talan er um vegin fram við teimum húsunum, sum frammanundan eru við Gerðisbreyt.

Útstykkingin er mestsum í tveimum. Annar parturin fær innkoyring frá Gerðisbreyt, og hin parturin fær innkoyring av Stórheyggi. Millum báðar partarnar verður so ein gøta., men ikki gjøgnumkoyring allan vegin.

- Tey, ið hava keypt grundstykki, kunnu fara undir byggingina so skjótt, útstykkingin er liðug. Og tað verður fyrsta dagin, sigur Jógvan Hans.

Stórur eftirspurningur er eftir grundstykkjum í Havn, og nú Velbastaður og Havnin hava lagt saman, er talan um somu kommunu. So henda útstykking styttir helst nakað um bíðilistan.

Tað er Byggitek, ið hevur gjørt arbeiðið fyri Jógvan Hans Østerø, timburmann á Velbastað.